


# Hells Angels óynsktir í Íslandi

Tá tríggir limir í Hells Angels komu til Keflavíkar við flogfari herfyri, gjørdi íslendska løgreglan av at senda menninar og konur teirra av aftur landinum. Íslendska netávísin mbl.is skrivar, at Hells Angels-fólkini komu úr Oslo, og ætlanin hjá teimum var at hátíðarhalda 11 ára dagin hjá íslendska MC-felagnum Fafnir. Íslendska løgreglan váttar yvirfyri netávísini, at teir hava noktað hesum trimum Hells Angels-monnunum og konum teirra innferðarloyvi. Tí vórðu fólkini steðgaði á flogvøllinum í Keflavík. Sum skilst, er hetta ikki fyrstu ferð, at íslendska løgreglan hevur noktað Hells Angels-fólkum at koma til Íslands. Íslendska løgreglan heldur ikki, at MC-felagið Fafner formelt hevur tilknýti til Hells Angels, men heldur kortini, at sterk bond eru millum partarnar. (-vilmund)

# ena meira enn kvinnur




*Sambært hagtølunum, sum Norðuratlantsbólkurin hevur fingið frá Danmarks Statestik, fáa tilsamans 5.890 føroyskir útisetar í Danmark ymisk sløg av almennum veitingum, sum koma í staðin fyri inntøku. Hesar kunnu býtast í tveir bólkar, fyribils veitingar og varandi veitingar. Fyribilsveitingar er eitt nú barnsburðarpeningur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Taka vit triðja ættarlið, tjenar maðurin 208.000 krónur og kvinnan stívliga 181.000 krónur.

Hyggja vit at einum øðrum aldursbólki (40-49 ár), er miðal bruttoinntøkan hjá manninum í fyrsta ættarliði stívliga 310.000 krónur, meðan kvinnan tjenar 238.000 krónur.

Í øðrum ættarliði í sama aldursbólki er inntøkan hjá manninum 364.500 krónur, meðan hon er góðar 280.000 krónur hjá kvinnuni.

Í triðja ættarliði er lutfallið ávikavist 288.900 og 259.900 krónur.

Tølini vísa eisini, at teir føroysku útisetar, sum tjena mest í Danmark, eru tey, sum eru millum 40 og 59 ár.

## Almennar veitingar

Sambært hagtølunum, fáa tilsamans 5.890 føroyskir útisetar í Danmark ymisk sløg av almennum veitingum, sum koma í staðin fyri inntøku. Hesar kunnu býtast í tveir bólkar, fyribils veitingar og varandi veitingar.

- Samanlagt fáa 3.814 útisetar fyribils veitingar, meðan 2.076 fáa varandi veitingar.

Í bóklinginum verður víst á, at 550 av teimum, sum fáa fyribils veitingar, fáa hesar vegna barnsburðarfarloyvi.

- Millum útisetar er vanligasta fyribils veitingin arbeiðsloysisstuðul, og vanligasta varandi veitingin er fólkapensjón.

Leivur Persson vísti á, at í nærum øllum bólkum av fyribils veitingum og í øllum bólkum av varandi veitingum eru tað fleiri konufólk enn manfólk, sum fáa hesar veitingar.

- Hetta er eisini galdandi við fólkapensjónini, har væl fleiri konufólk enn mannfólk eru fólkapensjónistar, segði hann.



*Havnin í Hanstholm er týdningarmesta fiskivinnuhavnin í Danmark*

# Minni fiskur í Hanstholm

Fiskurin, sum kemur upp á land í Hanstholm og verður seldur á uppboði, verður nú allur skildur hjá Hanstholm Samlesentral

Eftir at fýra sonevndir samlisentralar hava verið í Hanstholm í Danmark, eru nú bara tveir eftir. Á samlisentralunum verður fiskurin, sum skipini føra til lands, skildur eftir stødd og dygd, áðrenn hann verður bjóðaður út á fiskamarknaðinum.

Fiskurin verður nú skildur hjá Hanstholm Samlesentral, sum er sera væl útgjørdur og effektivur við nútímans skiljimaskinum.

Orsøkin til, at tørvurin á skiljing er minkandi í Hanstholm, er, at minni fiskur kemur upp á land, samstundis sum fleiri skip pakka fiskin umborð.

Tað er Fiskeri Tidende, sum ber hesi tíðindi.

Ein nýggj frágreiðing staðfestir annars, at havnin í Hanstholm er týdningarmiklasta fiskivinnuhavnin í Danmark.

Eisini á ferðavinnuøkinum er stórur flutningur. Ein týðandi orsøk er siglingin hjá Master Ferries, Fjord Line og Smyril Line.

Havnastjórin, Hans Kjær, sigur, at tilsamans flyta hesi trý reiðaríini 530.000 ferðandi, 119.000 persónbilar og 21.000 lastbilar um Hanstholm um árið.

(-vilmund)

# Ein nósi leitaði sær uppá land

**Í góðveðrinum leygardagin lá ein lítil kópur so fittur og svav uppi á landi í Rituvík**

**RITUVÍK**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ein nósi og ein summarseiður á lendingini í Rituvík seinnapartin leygardagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Vit vóru farin ein lítlan túr oman á lendingina í Rituvík stutt fyri skýming seinnapartin leygardagin. Komin oman um lunnarnar, sum liggja heilt av bakkanum og oman á sjógv, sást okkurt ljós og at síggja til loðið liggja ovast undir brimgarðinum har suðuri.

So hvørt, vit nærkaðust, sást, at hetta var ein kópur.

Tá ið vit vóru komin heilt oman til hansara, byrjaði hann so smátt at remba sær. Hann hugdi róligur upp, klóraði sær undir øsinum við "labbanum", geispaði og hevði líka sum hug at leggja seg aftur.

Nósin vísti eingi tekin til, at hann ætlaði sær á sjógvin undan okkum.

Undir liðini á honum lá ein nýdeyður summarseiður og bíðaði eftir, at nósin gjørdist svangur aftur.

So hvørt, sum hann gjørdist meira vakin og klárur, skimaðist hann stillisliga rundan um seg, geispaði aftur og klóraði sær enn einaferð.

Hevði hann kunnað tosað, hevði hann helst biðið um at fingið frið til at lagt seg aftur.

Vit tóku nakrar myndir og fóru síðan niðan aftur á bakkan.

Neyvan vóru vit komin heilt niðan aftur á bakkan, áðrenn hesin fitti nósi aftur var fallin í svøvn á lendingini í Rituvík.